

Fram- og baksíða av mynti sligin undir Haraldi Harðráða, kongi (1047-1066)

## SANDSSKATTURIN

Í 1863 fann gravarin ein myntskatt í útsynningshorninum í gamla kirkjugarði – hin einasta av sínum slagi í landinum. Talan er um 98 silvurmyntir, ið koma ymsastaðni frá í Evropu, Írlandi, Bretlandi og Skandinaviu. Myntirnir eru úr 11. øld, og helst eru teir niðurgrivnir um 1090 e.Kr. Rannsókn í 1972 vísti, at myntskatturin í síni tíð varð fjaldur undir steinsetta gólvinum í einum víkingaaldarbygningi. Flestu myntirnir eru á framsýningini á Tjóðsavninum í Brekkutúni í Hoyvík.

## SANDUR






*Útsýnið yvir Sandsvág við Skúvoy, Stóru og Lítlu Dímun í baksýni*

**Staðanavnakanningar og ognarviðurskifti eins og fornfrøðiligar leivdir í Sands bygd vísa, at økið hevur verið eitt ríkt landbúnaðarlendi frá elstu tíðum, har í minsta lagi tríggir garðar vóru longu í víkingaøld.**

**Síðani 1969 hevur Tjóðsavnið framt fornfrøðiligar kanningar í bygdini ymisk tíðarskeið. Rannsóknir innan verkætlanina "Heart of the Atlantic" hava avdúkað aldargamla búseting við forna kirkjustaðin, við Kirkjugarð, umframt í Junkarinsfløtti við bakkan norðanvert kirkjuna og á fyrndarbýlinginum á Sondum við norðara armin av Sandsvági.**

TJÓÐSAVNIÐ
FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM
NATURE AND CULTURE

Brekkutún 6
FO-188 Hoyvík
Faroe Islands
**Tel. +298 318076**
tjodsavnid@savn.fo
www.tjodsavnid.fo

Juli 2018 | FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR NORDIC ECOLABEL 541 705

www.tjodsavnid.fo

# FORNFRØÐI HEIMA Á SANDI

More info

TJÓÐSAVNIÐ
FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM
NATURE AND CULTURE



## Í JUNKARINSFLØTTI

Summarið 2000 ruddu partar av bakkanum norðanvert kirkjuna, har upp til 2 m tjúkkar fláir við fornum bústaðaleivdum komu til sjóndar. Í hesum køsta- og sandfláunum vóru ymiskar steinsetingar og forngripir, t.d. leiríløt úr føroyskum leiri, jarnlutir, eins og ílatabrot, evnað úr innfluttum fitisteini og brýni. Eisini varð funnið eitt vakurt bronsuspenni, tíðarfest til 10. øld.

Rannsóknir, sum fóru fram 2004-07, avdúkaðu leivdirnar av í minsta lagi tveimum bygningum eins og fláir tengdar vóru at teimum. Sermerkt fyri fláirnar var ørgrynnan av fiska- og djórabeinum og brendum korni – alt leivdir, burturkast, frá húsarhaldinum í víkingaøld og seinni.

Greiningin av væl varðveittu djórabeinunum veita okkum nýggja vitan um føðina og búskapin hjá teim fólkum, ið her búðu. Hesar bústaðaleivdir stava frá tíðarskeiðinum seint í 8. øld og til uml. ár 1200, tá fólk flyta niðan frá bakkanum. Eins og á víkingaaldar bústøðum aðrar staðir í útnorðri, vóru bæði neyt, seyður, svín og geitir hildin á gørðunum í Føroyum. Líkt er tó til, at her á staðnum hava tey gagnnýtt náttúrutilfeingið í størri mun enn vanligu húsdjórini. Ikki óvæntað hava íbúgvarnir heima á Sandi, og møguliga eisini aðra staðir kring landið, gagnnýtt stóra ríkidømið av fiski og fugli (toski og lunda), sum var við oyggjarnar.

## Á SONDUM

Í brimbarda, máaða bakkanum á Sondum síggjast leivdir eftir búseting frá elstu tíðum og fram til dagin í dag. Farið varð aftur undir at kanna bakkan í 2006-07, eftir at skrásetingar vóru gjørdar har í 1994.



Bakkin á Sondum er úr øsku- og køstafláum – leivdir frá húsarhaldinum gjøgnum øldir, sum hava skapt tað, vit nevna ein garðsheyg, ið er kent fyribrygdi við strendurnar í útnorði. Niðast í hesum áløgum eru leivdir av einum veggi og ymist innan í einum langhúsi frá tíðliga í víkingaøld, 8.-9./10. øld, ið stingur út undan bakkanum. Grundað á kolað byggkorn, funnin eru í tveimum blettum av torvmoldarøsku í fláum undir víkingaaldar bústaðarleivdunum, bar sum nakað heilt serligt til at staðfesta, at búleikast hevur verið á Sondum longu í 4.-6. øld og aftur í 7.-8. øld. Hetta eru elstu prógvini um búseting í Føroyum!



Brosnuspennið úr Junkarinsfløtti, 10. øld



## VIÐ KIRKJUGARÐ

**Fyri at veita rúm fyri líkgrevstri í nýggja partinum av kirkjugarðinum vóru í tíðarskeiðum árini 1970-2009 framdar fornfrøðiligar rannsóknir við atliti at friðaðum fornminnum í lendinum. Bert metur undir svørðinum finnast fornar bústaðarleivdir av øllum handa slagi. Rannsóknirnar hava avdúkað eitt umfatandi øki, har funnar eru leivdir av ymiskum bygningum, eina stóra væl steinsetta rennu við lokahellum, eins og ymiskar øsku- og køstafláir eru um alt lendið. Heyggjar við stórum nøgdum av hitasprongdum malagrótí geva ábending um, at í hesum lendinum við forna kirkjustaðin fóru fram onnur tiltøk og arbeiði enn á vanligari búseting. Í 1989 komu 11 víkingaaldar gravir undan kavi. Gravirnar lógu javnfjarar, vendandi so at siga eystur-vestur. Tey deyðu, øll ungir menn og kvinnur, høvdu fingið ymist við sær í grøvina, so sum ringar úr bronsu og silvuri og knívar við silvurtræðrum vavdum um skeftið, leðurbelti við einum áslagi úr bronsu, skapað sum djórahøvur. Við beltið var leðurpungur við blýloddum, eitt bronsubrot prunkað við eyðkendari írskari skreytlist eins og smá silvurbrot. Um hálsin høvdu nøkur teirra perluband við perlum úr beini, glas og rav. Í einari grøv var ein beinkambur. Í eini aðrari lá ein kvartur arabiskur (kufiskur) silvurmyntur frá seint í 9. øld – hin einasti funnin í Føroyum.**



Plantekning av teimum seks kirkjunum




## KIRKJAN OG GAMLI KIRKJUGARÐUR

Rannsóknir 1969-70 inni í verandi kirkju, bygd í 1839, vístu, at kirkjan stendur oman á leivdunum av fimm eldri kirkjum, sum hava staðið nett á sama staði. Hin elsta er ein lítil timburkirkja, ein stavkirkja av norskum slagi við jarðgrivnum hornastavum, tíðarfest til 1000-árini. Hin næsta í røðini var nakað væl størri, tillagað føroysk viðurskifti við tað, at alt timburverk var reist á grótsyll umgyrt av grótveggjum uttan fyri vesturskjøldurin. Á tann hátt varð spart upp á timbrið, eins og timbrið varð lyft upp frá slavnu moldini. 26 gravir, bæði mannfólk, konufólk og børn, eins og 42 í høvuðs-heitum norskir myntir úr 13. øld vórðu funnin í tilknýti til hesa kirkju. Báðar hesar elstu kirkjurnar høvdu smalt kór eystur úr skipinum. Í alt hava sostatt seks kirkjur verið reistar á hesum staði, hvør oman á aðrari.

